## Armstrong til Fraklands

Komandi ár verður heimskendi súkklarin, amerikanski Lance Armstrong, aftur at síggja á súkkluni í teimum ymsu súkklukappingunum. Armstrong, som skal súkkla fyri liðið Astana, boðaði mánakvøldið frá, at hann eisini fer at súkkla í Tour de France. Kappingin er heimsins største og strævnasta av sínum slag, og hesa kapping hevur Armstrong vunnið heilar sjey ferðir - øll árini frá 1999 til 2005. Vanliga súkklar eitt súkklulið fyri at fáa ein av sínum súkklarum fremstan í kappingini, og Lance Armstrong leggur einki í, um ikki Astana súkklar fyri sigri til hansara. - Súkkling er ein liðítróttur, og eg súkkli fyri tí besta súkklaranum, sigur Armstrong við AP. Væntað verður, at 37 ára gamli Armstrong og hinir á Astana-liðnum fara at súkkla fyri sigri til spanska Alberto Contador, sum seinastu tvey árini hevur vunnið tríggjar tær størstu súkklukappingarnar, nevniliga Giro d´Italia, Vuelta a España og Tour de France.

## Liverpool á odda

Liverpool hava yvirtikið oddasessin í Premier League, men bara við einum stigi, tí teir megnaðu ikki at fáa meiri enn javnleik í dystinum móti West Ham í gjárkvøldið. Tað er triðja ferðin í ár, at Liverpool spælir ein málleysan dyst heima í Anfield Road. Liverpool hevði fleiri kjansir, men tann største fyri steðgin átti West Ham og fyrrverandi Liverpool-leikarin Craig Bellamy, men skot hansara langt úti frá rakti stongina. Í seinna hálvleiki átti Liverpool hinvegin nógv tann største kjansin, men Youssi Benayoun, men West Ham málverjin stórbjargaði skotroyndini úr stuttari fjarstøðu. Liverpool fer við eina stiginum, teir fingu úr dystinum, framum Chelsea á stigatalvuni, soleiðis at teir nú hava 34 stig.

# Noreg er stórfavorittur

**Meðan garvaði norski landsliðsvenjarin, Marit Breivik roynir at niðurtóna, at Noreg er favorittur til at vinna EM. So royni hinir venjarnir at gera norsku kvinnurnar til tungar favorittar til at vinna kappingina.**

HONDBÓLTUR
*Heri Simonsen*
*heris@sosialurin.fo*



*Hóast liðið má vera Gro Hammerseng fyriuttan, so er fáur, sum ivast í, at Noreg nú leggur eitt EM-gull afturat velduga avrikslistanum*

*Mynd: Polfoto/AP*

Norsku kvinnurnar eru í stórformi. Fyri stuttum vunnu tær á Russlandi og Danmark við ávikavist 10 og 12 málum. Venjarin hjá svenska kvinnulandsliðnum, Ulf Schefvert er heldur ikki í iva, at Noreg er favorittur til at vinna EM-gullið heimaftur til Noregs. Sjálvt um stórspælarnir, Katja Nyberg og Gro Hammerseng eru uttanfyri, orsaka av skaða, so er svenski venjarin ikki í iva um, at tær norsku kvinnurnar eru favorittar kortini. Ungarski spælarin, Katalin Pálinger er heldur ikki í iva. Hon heldur, at Noreg framalir nýggjar góðar spælarar alla tíðina.

### Avrikslistin hjá Breivik

Tað hevur eisini gingið framúr væl hjá Marit Breivik, sum hevur vunnið nógv metal við norska liðnum. Tað er heldur ikki smávegis, sum norski venjarin, Marit Breivik hevur vunnið við norska kvinnulandsliðnum síðani 1994. Einastandandi avriksleistin hjá Breivik við kvinnulandsliðnum sæst aðrastaðni á síðuni.

### Metir Rumenia sterkt

Marit Breivik hevur sjálv gjørt sær nakrar tankar um, hvør kann hugsast at skula kappast við Noreg, um at vinna EM-gullið. – Vit vita, at tær rumensku eru góðar. Tær koyra við næstan sama liðið, sum til OL í Beijing. Men liðið hevur fingið nýggjar venjarar, og tað skulu tær sjálvsagt venja seg við. Men nú hava tær rumensku so havt nakrar vikur um tað.

Marit Breivik heldur eisini, at Týskland er ein hóttan. Ungarn hevur eisini eitt sterkt lið, og tá Spania fyri stuttum hevur vunnið á Fraklandi, so boðar tað eisini frá einum sterkum sponskum liði. Norska pressan manglar sjáldan sjálvsálit, og Frode Scheie hjá norsku sjónvarpsstøðini TV2, metir, at Noreg er tann størsti favoritturin nakrantíð til at vinna eitt EM-endaspæl. Danskir ítróttarskrivarar hava eisini ringt at fáa eyga á, hvør kann koppa norsku gentunum.

### FAKTA

**Norski hópurin:**

**Málverjar**: Kari Aalvik Grimsbø, Terese Pedersen, Katrine Lunde Haraldsen
Høgri vongur: Ragnhild Aamodt, Linn Kristin Riegelhuth
**Strikuspælari**: Heidi Løke, Marit Malm Frafjord, Isabel Blanco
Vinstri vongur: Camilla Herrem, Kari Mette Johansen
**Høgri bakkur**: Tonje Nøstvold, Karoline Dyhre Breivang, Linn Jørum Sulland
**Miðbakkur**: Tine Rustad Kristiansen, Tonje Larsen
**Vinstri bakkur**: Kristine Lunde

### FAKTA

**Við Marit Breivik hevur Noreg vunnið**

1994: EM: bronsa
1996: EM: silvur
1997: HM: silvur
1998: EM: gull
1999: HM: gull
2000: OL: bronsa
2002: EM: silvur
2006: EM: gull
2007: HM: silvur
2008: OL: gull

## NM-hópurin úttikin

Um vikuskiftið vóru FM-finalurnar í talvi fyri ung á skránni í Eysturskúlanum í Havn.

Umframt heitið sum føroyameistarar, so er hetta eisini kappingin, sum gevur atgongd til NM-kappingina, og sleppa tey bæði fremstu í hvørjum bólki at luttaka.

NM-hópurin, sum luttekur í februar mánað 2009 í Føroyum - ímóti 50 javnaldrum úr hinum Norðurlondunum:

IM Helgi Dam Ziska, Margar Berg og Hjalti Toftum Jógvansson úr Tórshavn.

Rógvi Egilstoft Nielsen, Høgni Egilstoft Nielsen og Silas Eyðsteinsson úr Sandavági.

Einar Gregersen, Heðin Gregersen og Julian Gregersen úr Klaksvík.

Pætur Poulsen úr Skopun.

Silas Eyðsteinsson og Julian Gregersen eru nýggir í NM-høpi.

**-heris**



*Har stóð nógv á, tá avgerandi talvini vóru á skránni*

*Mynd: www.faroechess.com*